# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Rógvi er stóra ivamálið

**Ikki fyrr enn á dystardegnum verður endalig støða tikin til, um Rógvi Jacobsen er partur av føroyska hópinum móti Litava**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Við tíggju málum er Rógvi Jacobsen tann spælarin, sum hevur skorað flestu málini fyri landsliðini. Ja, seinnu árini hevur tað mest sum verið so, at hann eisini er tann einasti, sum skorar. Eitt mynstur, sum Bogi Løkin tó var somikið raskur at bróta leygardagin.

Men hetta saman við styrkini hjá Rógva í luftspælinum ger hann til ein serstakliga týdningarmiklan spælarar fyri Føroyar, og tí verður bíðað til seinastu løtu, áðrenn liðið verður endaliga sett.

Umframt Rógva, so hevur Bogi Løkin eisini ein skaða í lærkrikanum. Meðan landsliðsfelagarnir vandu í gjár, hevði Bogi servenjing saman við fysioterapeuti, men teir báðir spældu eisini bólt sínamillum, og roknað verður við, at hetjan frá Tórsvølli er førur fyri at spæla ein leiklut í dystinum. Nakað sum eisini er tiltrongt, nú Jákup á Borg mátti geva avboð vegna skaða.



*Rógvi Jacobsen er her í ferð við at gera strekk-venjingar. Í gjár tók hann lut í lættara partinum av føroysku landsliðsvenjingini*

# Vandu alt fyri eitt

**Føroyski landsliðshópurin var ikki meira enn lendur í Vilnius, fyrr enn fyrsta venjingin stóð á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, valdi at fáa ringastu ferðamøðina úr kroppinum alt fyri eitt, sum spælararnir komu til Kaunas um 17-tíðina lokala tíð. Eftir at hava hildið ein uppibornan frídag sunnudagin vóru landsliðsspælararnir við flogfarinum úr Vágum longu klokkan 8.15 um morgunin, og tí var talan um ein hampuliga drúgvan ferðadag, sum skuldi ristast úr kroppinum.

Saman við strævna dystinum leygardagin bar hetta við sær, at talan einamest gjørdist um heilt lætta venjing hjá teimum, sum høvdu spælt flestu minuttirnar á Tórsvølli, og stóð Øssur Steinhólm, fysioterapeutur, fyri størsta partinum av hesi venjingini.

Teir spælarar, sum ikki vóru eins møddir, høvdu eitt sindur meira av ferð í sínari venjing, eins og teir høvdu skotvenjing, meðan Bogi Løkin varð settur at testa lærkrikan, sum hevur argað síðani leygardagin.

Vanliga eru venjingar eisini á skránni týsdagin, men hesa ferð verður talan so bert um tí einu av slagnum, og verður hendan í kvøld á S. Dariaus ir S. Gireno leikvøllinum, har dysturin verður spældur.

Og so er annars bara at vóna, at venjingin í gjár vakti góð minni. Hendan gekk nevnliga fyri seg á sama vølli í Vilnius, har landsliðið fyri mest sum akkurát 10 árum spældi málleysan javnleik móti Litava.



*Øssur Steinhólm, fysioterapeutur, tók sær av strekkvenjingini, sum fekk høga raðfesting í gjár*

## Stígur í hjá føroyingum í Klaksvík International

**Føroysku telvararnir Heini Olsen, Martin Poulsen og Olaf Berg taptu allir síni talv, tá 3. umfar í Klaksvík International varð telvað seinnapartin**

TALV
*Jógvan Joensen*
*jogvan@kallnet.fo*

Triðji stórmeistarin upp í slag gjørdist ov stórur biti hjá Heina Olsen, sum við svarta fólkinum tapti á svenska stórmeistaranum GM Ralf Åkesson. Talvið gjørdist rættiliga trupult hjá báðum pørtum og tíðin gekk av álvara undan hjá Heina, sum tíverri snávaði í avgerðandi løtunum, hóast møguleikar avgjørt vóru til meira.

Martin Poulsen kom við svarta fólkinum, at standa í undirkantinum rættiliga tíðliga í talvinum og danin IM Esben Lund telvdi trygt sigurin til høldar. Hinvegin gav Olaf Berg altjóða meistaranum IM S. Tapani munadygga mótstøðu, sjálvt um tað sýntist sum um, at finnin støðugt hevði kontrol á støðuni og sigraði tá avtornaði.

**Úrslitini seinnapartin:**
- GM M. Grabarzyk – GM G. Jones 0-1
- GM R. Åkesson – FM Heini Olsen 1-0
- IM E. Lund – Martin Poulsen 1-0
- Olaf Berg – IM S. Tapani 0-1
- GM S. Sulskis – FM D. Semcesen 1-0

Stórmeistarin Sarunas Sulskis, sum er styrkismettur ovast í kappingini er á odda við fullum stigatali. Sulskis telvar sera orkufrekt og undirhaldandi og gerst alsamt greiðari favorittur at vinna kappingina.

Talvini eru at finna á heimasíðu Talvsambandsins:
www.faroechess.com